## Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins 2008

Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins verður í ár latin fyri 14. ferð. Virðislønin er 350.000 d.kr.

**EVNIÐ Í 2008**

**Minni orkunýtsla við betri amboðum**

Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins verður í 2008 latin norðurlendskari framleiðslu, uppfinning ella tænastu, sum hevur hjálpt til at minka um orkunýtslu borgaranna.

Virðislønin verður í ár latin privatum ella almennum virki, felagsskapi ella einstaklingi (møguliga einum uppfinnara ella granskara). Framleiðslan, uppfinningin ella tænastan skal kunna brúkast í øllum Norðurlondunum og hava munandi ávirkan. Framleiðslan, uppfinningin ella tænastan kann snúgva seg um stórar skipanir og einstakar lutir.

Øll kunnu senda inn uppskot til vinnara. Grundgeving fyri uppskotinum skal lýsa breidd, góðsku, avleiðingar og luttøku, sum skal viðleggjast ella viðheftast og kunna kopierast. Uppskotið skal innihalda lýsing av arbeiðinum og upplýsingar um, hvør fremur ella hevur framt verkið. Uppskotið skal orðast á í mesta lagi tveimum A4-síðum.

Vinnarin av virðislønini verður útnevndur av eini dómsnevnd, ið hevur umboð úr Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi, Danmark, Grønlandi, Føroyum og Álandi.

Uppskotið, ið skal skrivast á eitt serligt skjal, skal vera inni í seinasta lagi **fríggjadagin hin 25. apríl 2008, kl. 12.00.** Skjalið fæst á heimasíðu Norðurlandaráðsins www.norden.org ella við at venda sær til skrivstovuna hjá donsku sendinevndini:

**NORDISK RÅD**
**Den Danske Delegation**
**Christiansborg**
**DK 1240 København K**
**Tlf. +45 33 37 59 99, fax +45 33 37 59 64**
**e-mail: nrpost@ft.dk**

## LÝSING EFTIR DAGRØKTARUM

**Søkt verður eftir dagrøktarum til kommunalu dagrøktina í Fuglafjarðar kommunu at byrja tann 01. apríl 2008 ella skjótast tilber.**

Ein treyt fyri at søkja starvið er, at dagrøktarheimið skal verða barnavinarligt innrættað, har rúm er til børnini at spæla, og at eitt hóskandi trygt spæliøki er uttanfyri.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsningar um størvini fáast við at ringja til Eyðgerð A. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 73 77 94, ella sosialdeildarleiðaran á telefon 73 77 56.

Møguligar umsókinir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða **Fuglafjarðar kommunu**, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi **leygardagin tann 29. mars 2008.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

**Fuglafjarðar Kommuna**

## Aðalfundur hjá Havnar Framburðsfelag

Sum gamal siður er, verður aðalfundurin hjá Havnar Framburðsfelag hildin á Grækarismessu á Hotel Hafnia

Johnny í Grótinum fer at halda fyrilestur um búskaparstøðuna

Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins luttekur á fundinum

Fundurin byrjar kl. 19.00

Nevndin

**Reyði Krossur Føroya**

Aðalfundurin hjá Reyði Krossur Føroya verður **sunnudagin 30. mars 2008 kl. 15:00** í húsið felagsins.

Eftir aðalfundin fortelur Hans Holm um Romano fólkið *(Sigøjnarar)*

Nýggir limir kunnu gjalda limagjaldið á konto i banka. kr. 150,- húski og kr. 400,- fyri feløg/stovnar

TJÓÐVELDI

## Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Sandoyar Tjóðveldisfelag verður í Virkinum á Sandi 7. mars kl. 20.00

*Møtið fjølment*

**Nevndin**

## Søkt verður eftir stýrimanni

at sigla við sandbáti, helst búsitandi í danmark.

**Førleikakrøv:**
Sætteskipari vid handilsskipum
ella stýrmaður av 3 grad.

Áhugaði kunnu ringja á tlf. 20358952 og tosa við Stig Isaksen skipara um nærri upplýsingar.

**temp-team**
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM

## Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**
TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**

## Skáp til sølu

Ring 341815

